TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Stuðulspedagogar til serstovu

**Søkt verður eftir 2 stuðulspedagogum á 40 t/v til serstovuna í Øksnagerði**

Serstovan í Øksnagerði er eitt royndartiltak hjá Tórshavnar kommunu.

**Talan er um**
eina barnagarðsstovu við 12 børnum, har ein partur eru børn við serligum tørvi:
- ávísar kontakt og/ella samskiftistrupulleikar
- tørv á einum forútsigiligum gerandisdegi í einum skipaðum umhvørvi
- tørv á miðvísari mál- og samskiftisstimbran
- tørv á at royna seg í samspæli við børn uttan serligar kontakt- og samskiftistrupulleikar í tann mun, tey megna tað.

**Ætlanin er**
at uppbyggja eitt miðvíst, visuelt samskiftisumhvørvi , ið krevur serliga manning.

Stuðlarnir og tann fasta manningin á stovuni arbeiða saman í toymi undir leiðslu av stovnsleiðaranum. Stuðulsfólkaskipanin ráðgevur í tann mun, tørvur er á tí.

**Førleikakrøv**
Dentur verður lagdur á:
- at umsøkjararnir hava royndir við børnum og innan tað sosialpedagogiska arbeiðsøkið.
- at viðkomandi hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum, við serligum tørvi.
- at umsøkjarin er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðnum og er opin fyri menning í arbeiðnum.

**Setanarviðurskifti**
Stuðlarnir verða settir av Stuðulsfólkaskipanini til hesa verkætlan. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

**Meiri fæst at vita**
um serstovuna og størvini við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini tlf. 315160 ella Jesper Roos Nielsen, stovnsleiðara 319959.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi sum skjótast. Viðmerk á umsóknina "Serstovan"

SNARSKIVAN

Avloysarastarv

## Ferðslusamskipari

Í sambandi við barnburðarfarloyvi verður søkt eftir einum avloysara til starvi sum ferðslusamskipari á fólkaflutningsdeildini í umleið 8 mánaðir. (Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir).

**Uppgávur og ábyrgd hjá ferðslusamskiparanum**
Høvuðsuppgávan hjá ferðslusamskiparanum verður at tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av dagliga fólkaflutninginum innan Bygdaleiðir og Oyggjaleiðir.
Aðrar uppgávur hjá ferðslusamskiparanum verða m.a.:
- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagliga fólkaflutninginum
- Taka ímóti bíleggingum
- Gera flutningsavtalur
- Fyrisita koyri- og vaktarskipanir
- Verða við í arbeiðinum at gera ferðaætlan
- Vakt eftir vanliga arbeiðstíð
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti

**Førleikakrøv**
- Útbúgving innan ferðslustýring, busskoyring e.l.
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum
- Góðan kunnleika og royndir innan edv á brúkarastøði
- Kunnleiki til formlig krøv innan rakstur av ferðamannaskipum og akførum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.
Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður kann byrja skjótast gjørligt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

*Strandfaraskip Landsins*
*Starvsfólkadeildin*
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 28.januar 2002.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðar.

Tlf. 34 30 00 ella e-postur: pjt@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir fólki við útbúgving til skrivstovu okkara skjótast tilber.

Umsókn verður at senda til:

**Sp/f Valdemar Lützen**
Skálatrøð
Postboks 20
110 Tórshavn

## Pedagogar!!!

Dagstovnurin í Kvívík søkir eftir einum pedagogi, at starvast fyri pedagog, sum fer í farloyvi í eitt ár, frá 1. mars 2002 til 1. mars 2003.

Starvið er í vøggustovuni 40 tímar um vikuna.

Vit vænta tú hevur hug at verða saman við teim yngstu á stovninum og kann vera við til at geva teimum ein tryggan og góðan uppvøkstur.

Dagstovnurin í Kvívík er normeraður til 10 børn í aldrinum 0-3 ár og 20 børn í aldrinum 3-7 ár.

Starvið er lønt eftir sáttmála hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi, í seinasta lagi 15. februar 2002.

Meir fæst at vita um starvið, við at venda sær til stovnin á tlf. 421660. Spyr eftir leiðaranum.

**Dagstovnurin í Kvívík**
FO-340 Kvívík

## Arbeiðsfólk søkist

Til skúlan og ítróttarhøllina á Giljanesi, verður søkt eftir arbeiðsfólki.

Arbeitt verður bara í vikuskiftunum.

Arbeiðið umfatar: Vaktarhald og reingerð.

Løn samb. sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag.

Upplýsingar um arbeiðið fáast við at venda sær til Jógvan S. Hansen, formaður í Hallar– og Skúlanevndini. Tlf.: 221864 og 333064

**Miðvágs og Sandavágs kommunur**

## Frá Happadráttinum

**Seinasti søludagur til 1. drátt er 7. februar**

Seðilin spælir við í trimum dráttum

70% av søluvirðinum verður latið til vinningar

HIN FØROYSKI HAPPADRÁTTINUM

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Pedagogar

### til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 t. viku og 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. mars 2002. Størvini eru á stovu við 12 børnum 0-3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku at byrja 1. mars 2002. Starvið er á stovu við 12 børnum 0-3 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag/Fíggjarmálastýrið og kommunurnar.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum tlf. 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 1. februar 2002 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 14. januar 2002

**Fuglafjarðar býráð**

## Útbjóðing

Sumbiar kommuna bjóðar hervið út arbeiði at flyta 20.000 rúmmetrar av gróti frá grótdunganum á Lopranseiði oman í Ónavík, har tað skal leggjast út til havnaøkið.

Boðini skulu verða Sumbiar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 28. januar 2002 kl. 1800.

Fleiri upplýsingar um arbeiði kunnu fáast við at venda sær til Sumbiar kommunu á telefon 224894.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini ella havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344
Fax +298 370114

## Bilur til sølu



Toyota Corolla, árg. 1999, koyrt 47.000 km. Nýggj píkadekk.

**Ring tlf. 448330 ella 218330**

# Val av UMBOÐSRÁÐI
## fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar

**Í februar mánaði ár 2002 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Tryggingarfelagið Føroyar. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2002.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum.

**Allir felagsins tryggingartakarar eru limir í felagnum.**

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, ið teknar øll sløg av skaðatryggingum. Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi. Umboðsráðið velur nevnd felagsins. Afturat hesum velja starvsfólkini í felagnum nevndarlimir sambært ta til eina og hvørja tíð verandi lóg um tryggingarvirksemi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavist 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni og øllum avgreiðslunum.

**Tórshavn, 14. januar 2002**

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel+298 345600
Fax+298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355

Føroya Postfelag

## Føroya Postfelag

boðar við hesum frá, at aðalfundur felagsins verður í B36 húsinum leygardagin 23. februar 2002 kl. 10.00.

Dagsskrá samb. lógum felagsins.

Uppskot ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera send felagnum í seinasta lagi 3 vikur undan aðalfundinum – t.e. leygardagin 2. februar 2002.

**Nevndin**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Opel Astra 2.0 Turbo Diesel – 3 hurðar
**Árg.:** 1999
**KM.:** 55.000

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
e-mail: bjb@trygging.fo
beinl. tlf. 345771
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08.30–10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00